# Tilboðsfyrispurningur eftir kt-mennarum

## 1. Inngangur

Undirvísingarstýrið hevur í eitt avmarkað tíðarskeið brúk fyri tveimum ella trimum kt-mennarum treytað av, hvussu samansetingin er av førleikum. Talan kann verða um ávikavist frontend- og backend- ella fullstack-mennarar (bæði frontend og backend). Mett verður, at umleið 75% av tímanýtlsuni fer til backendmenning og umleið 25% til frontendmenning.

Veitarar kunnu geva tilboð uppá ein, tveir ella tríggjar navngivnar kt-mennarar. Umráðandi er at viðmerkja, um talan er um frontend-, backend- ella fullstack-mennarar.

## 2. Uppgávan hjá mennarum

Uppgávan fevnir um at byggja menningarpall, tøkniligar mannagongdir og "Proof of Concept". Arbeiðið kemur at leggja støði undir menning av felags lestrarfyrisitingarskipan til undirvísingarverkið.

## 3. Tímatal og tíðarskeið

Samlaða tímatalið er mett at verða umleið 600 tímar fyri allar tríggjar mennararnar sum meginregla í vanligari arbeiðstíð í tíðarskeiðinum frá 1. november 2021 og fram til og við 20. januar 2022.

## 4. Staðseting og arbeiðsleistur

Arbeiðsplássið er Undirvísingarstýrið, Hoyvíksvegur 72. Mennarar koma at arbeiða saman í einum toymi undir leiðslu av verkætlanarleiðara og kt-arkitektinum hjá Undirvísingarstýrinum. Arbeitt verður eftir SCRUM-leistinum.

## 5. Yvirskipað krøv til tilboðið

- at mennari er nevndur við navni
- at mennari hevur viðkomandi útbúgving og royndir

## 6. Backend førleikar

Tað verður vektað positivt, um mennari:

- hevur í minsta lagi 5 ára starvsroyndir við menning á .Net pallinum
- kann vísa á royndir við menning og/ella uppsetan av loysnum har hýsing og rakstur verður gjørt í MS Azure Cloud
- kann vísa á menning og/ella uppsetan av loysnum, sum fylgja DevOps hugsjónini

- kann vísa á royndir við at arbeiða eftir SCRUM-leistinum

Tað verður harumframt vektað positivt, um mennari kann vísa á royndir við fleiri av hesum:

  - Kubernetes, t.d. Azure Kubernetes Service
  - Docker og Container Registries, t.d. Azure Container Registry
  - Message Queuing (MQ), t.d. Azure Service Bus, RabbitMQ
  - Load Balancing, t.d. Azure API Gateway, Nginx
  - CI/CD Pipelines, t.d. Azure Pipelines, GitHub, TFS
  - Git, t.d. Azure Repos, GitHub, TFS
  - MS SQL og/ella Azure SQL
  - Microservices
  - C#/.Net Core (ella .Net Standard)
  - C#/.Net Core Web API
  - C# forritan:
    - Domain Driven Design (DDD)
    - Visual Studio/VS Code brúkt saman við Docker og møguliga Kubernetes
    - Kend patterns, t.d. IOC, DI, UnitOfWork
    - Docker Containers sum microservices
    - TDD, m.a. Unit Test og Integration Test
    - Entity Framework
    - Web Services, t.e. REST/JSON og SOAP
    - Message Queuing (MQ)
    - Framleiðslu av NuGet pakkum

**7. Frontend førleikar**

Tað verður vektað positivt, um mennari:

- hevur í minsta lagi 3 ára starvsroyndir við frontend applikatiónsmenning
- hevur royndir við at arbeiða saman við UX-sniðgeva

Harumframt verður tað vektað positivt, um mennari kann vísa á royndir við fleiri av hesum:

- React JS
- JavaScript
- TypeScript
- Frontend brúkarastýring (innritan og rættindi)
- Nýtslu av backend services
- Kendo React (Telerik)

**8. Krøv til tilboð**

Í tilboðnum skal vera upplýst:

- Navn og CV hjá mennara við frágreiðing um, hvussu krøv og ynski omanfyri (pkt. 5-7) verða lokin
- Navn og skrásetingarnummar hjá fyritøku

- Prísur pr. tíma uttan MVG

**9. Vekting og val av mennarum**

Millum innkomnu tilboðini, sum lúka krøvini, verður vektað eftir ávikavist prísi og førleikum (nevndir omanfyri í pkt. 5-7). Prísur telur 50% og førleikar telja 50%.

At virka ímóti bundinskapi at *einum* veitara (vendor lock-in) tilskilar Undirvísingarstýrið sær rætt til at velja millum fleiri veitarar, um talan ikki er um týðandi frávik millum innkomnu tilboðini.

Undirvísingarstýrið tilskilar sær somuleiðis rætt til ikki gera nýtslu av nøkrum av innkomnu tilboðunum.

**10. Tíðarfreistir**

Tilboð skulu sendast til: mortanz@uvs.fo í seinasta lagi mikudag 13. oktober 2021, kl. 12:00. Miðað verður eftir, at sáttmálin er undirskrivaður í seinasta lagi fríggjadagin 22. oktober 2021.

**11. Nærri kunning**

Nærri kunning finst á heimasíðuni www.skulin.fo. Eru spurningar um útboðstilfarið og uppgávuna, ber til at venda sær til Mortan Zachariassen á tel. 555074 ella telduposti: mortanz@uvs.fo.